# Dúgvan og Ternan hjálpast at

**Nú er greitt, at Dúgvan og Ternan framyvir fara at røkja siglingina um Leirvíksfjørð. Sum skilst so er talan um, at ferjurnar báðar skulu skiftast um at røkja ferðaætlanina og so vera hjálparskip, tá ið ástendur, um fjørðin**



*Dúgvan og Ternan fara framyvir at røkja siglingina um Leirvíksfjørð, har tær fara at skiftast um at vera ferjan, sum røkir ferðaætlanina og at vera hjálparferja*

STRANDFERÐSLAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Dúgvan, sum hevur røkt siglingina um Leirvíksfjørð í mong ár nú, liggur í dokk. Ternan er so sett inn í sigling fyri hana. Hetta hevur fingið fleiri søgur at ganga um, at Ternan framyvir fer at sigla eftir ferðaætlanini um Leirvíksfjørð. Hetta er tó sambært Regini Vágadal á Strandferðsluni ikki heilt rætt.

– Tað er skeivt at siga, at Ternan verður høvuðsskip, tí ferjurnar báðar koma at skiftast um at sigla eftir ferðaætlanini, sigur hann.

Hetta skal skiljast soleiðis, at til dømis fer Dúgvan at sigla fyrstu túrarnir um morgunin, har Ternan siglir tveir hjálpartúrar. Síðani skifta ferjurnar um seinni út á fyrrapartin, tá Ternan fer inn í sigling sambært ferðaætlanini og Dúgvan verður hjálparskip. Ella umvent. Og so aftur seinni um kvøldið fer Dúgvan aftur í ferðaætlan og Ternan siglir ein hjálpartúr við møguleika fyri einum eykatúri afturat, sum tó ikki er endaliga lagdur í ferðaætlanina enn. Hetta tí at Strandferðslan vil líka síggja mynstrið fyrst fyri at vita, hvussu tørvurin er.

### Tænastustøðið hækkar

Leirvíksfjarðabólkurin, sum hevur arbeitt saman við Strandferðsluni í hesum málinum, er sera fegin um, at Ternan nú eisini verður sett í sigling um Leirvíksfjørð. Formaður í bólkinum er Rani Nolsøe, og hann sigur, at um ein ikki hyggur at tveimum smálutum í ferðaætlanini, so er hetta so avgjørt ein munandi øking í tænastustøðinum um Leirvíksfjørð.

– Vit fegnast sjálvandi um, at Sam nú fer úr siglingi, og vit fáa tvey góð skip at røkja siglingina um Leirvíksfjørð, men tað eru nakrir smálutir, sum irretera. Til dømis at tann eini seinnapartstúrurin er lagdur sum eykatúrur, og at gloppið í siglingini leygarmorgun um níggjutíðina framhaldandi verður har. Og tað duga vit ikki at síggja nakra orsøk til, tá ein hevur tvey skip siglandi, sigur Rani Nolsøe.

Hann sigur, at orsøkin til, at eitt glopp er har leygarmorgun er venjing. Men hann leggur dent á, at við tveimum skipum siglandi, mátti tað borið til at havt túrin klokkan 8:45 av Klaksvík og 9:30 av Leirvík leygarmorgun inni í ferðaætlanini kortini.

– Men alt í alt so eru vit sjálvandi ovurfegin um hesa økingina í kapasitetinum um Leirvíksfjørð, sigur Rani Nolsøe.

Strandferðslan fer at senda út eitt tíðindaskriv í hesi vikuni í sambandi við, at nýggja ferðaætlanin kemur í gildi, har greitt verður frá henni og møguligum broytingum. Við tíðindaskrivinum vónar Regin Vágadal, at óvissur um eitt nú Leirvíksfjarðarleiðina verða burtur.




# Sum heild góðir roknskapir kunngjørdir

MARKNAÐARRÁK

Sum væntað, varð óstøðugt á virðisbrævamarknaðunum í farnu viku, og marknaðirnir vóru í stóran mun stýrdir av roknskaparkunngerðum. Serligur áhugi var fyri Texas Instruments og Microsoft, ið bæði kunngjørdu eina góða gongd farna ársfjórðingin. Hóast bæði eisini høvdu toluliga bjartar vónir um komandi tíðina, høvdu partabrævagreinarar væntað, at Microsoft fór at vera enn bjartari enn staðfest varð. Microsoft er tí fallin um 8% seinastu dagarnar.

Millum norðurlendsku virkini, ið kunngjørdu í farnu viku vóru Volvo, Electrolux og Norsk Hydro. Norsk Hydro, og serliga Volvo kunngjørdu ein góðan roknskap, meðan Electrolux gjørdist eitt satt vónbrot.

S&P 500 er vísital, ið umfatar 500 tey týdningarmestu virkini í USA. Bróðurparturin av hesum hava higartil kunngjørt roknskap, og áhugavert er at leggja til merkis, at um 70% av hesum, hava kunngjørt eina inntøkuhækking. Kortini hevur hetta ikki ávirkað partabrævamarknaðinar stórvegis. Orsøkin er, at sera høgar vónir hava verið um roknskapirnar, samstundis sum partabrøv í løtuni liggja høgt. Orsakað av hesum, er og verður marknaðurin serliga viðbrekin mótvegis roknskapum við úrslitum vánaligari enn væntaði. Partabrøv fullu tí sum heild í farnu viku, hóast fáir vánaligir roknskapir vóru kunngjørdir.

Aftur í farnu gjørdust tíðindi frá amerikanska arbeiðsmarknaðinum bjørt, og enn einaferð varð staðfest, at betur gongur á hesum økinum. Hetta er ein av orsøkunum til, at vit meta, at amerikanski tjóðbankin ikki fer at pilka við leiðandi rentuna á fundi teirra týsdagin. Tjóðbankin vil sanlíkt staðfesta, at tey eru bjørt um búskaparvøksturin í USA, og at búskaparliga framgongdin er í tryggari legu. Hetta vil sannlíkt eisini verða staðfest, tá dagførd uppgerð av amerikanska búskaparvøkstrinum verður kunngjørd hósdagin.

Áhugaverd virkir, sum kunngerða roknskap hesa vikuna eru m.a. Ericsson, Danske Bank, Nordea, Deutsche Bank, Novo Nordisk og fleiri av stóru altjóða oljuvirkjunum, men at kalla einki kent amerikanskt virki kunngerð. Tískil kann væntast, at búskaparligu uppgerðirnar fáa størri týdning hesa vikuna. Marknaðarrák metur tí, at lánsbrævarentur og partabrøv liggja á sama stigi ella hægri, tá vikan er av. Støðan er kortini framvegis tann, at høgu partabrævakursirnir kunnu føra við sær vinningsstaðfesting, og hetta kann broyta myndina.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,90% | -0,03% |
| 5 ára lánsbræv | 3,73% | -0,03% |
| 10 ára lánsbræv | 4,49% | 0,00% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 256,2 | -1,0% |
| OMX, Svøríki | 611,2 | -0,3% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.481,2 | -1,9% |
| S&P 500, USA | 1.028,9 | -1,0% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,60 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 163,67 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 69,86 | -1,3% |
| Altjóa Partabrøv | 71,37 | -3,7% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 631,47 | -1,1% |
| EUR | 743,13 | 0,0% |
| GBP | 1.070,65 | 0,3% |
| NOK | 89,95 | 0,5% |

Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.



# Truplari og truplari at arbeiða fisk í Føroyum

**– Tað hevur nógv størri týdning at tosa um betri flogsamband við umheimin enn at tosa um undirsjóvartunlar, sigur Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Egil Olsen sær tríggjar møguleikar hjá føroyingum at fóta sær aftur og at varðveita kappingarførið í fiskivinnuni*

– Tað verður truplari og truplari at arbeiða fisk í Føroyum.

Tað spáar Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur.

Aðrastaðni í blaðnum í dag hevur hann sera áhugaverdar grein um føroysku fiskivinnuna, nú alsamt meiri og meiri fiskur verður fluttur óvirkaður av landinum.

Samstundis hugleiðir hann, um, hvussu føroyingar kunnu fóta sær aftur, hvussu vit kunnu taka kappingina upp við onnur lond um fiskin og hvussu vit kunnu styrkja okkum á marknaðinum.

Og tá ið hann hugsar um onnur lond, eru tað lond har arbeiðslønin er lág, fyrst og fremst Kina.

Egil Olsen sigur, at frá 1996 til 2001 meira enn fimmfaldaðist útflutingurin av frystum fiskaúrdráttum úr Kina. Ì 1996 var útflutningurin úr Kina 900 milliónir krónur og í 2001 var útflutningurin, vaksin til slakar fimm milliardir. Høvuðsmarknaðirnir fyri kinverskar fiskaúrdráttir eru, USA, Fjareystur og Evropa men í 2001 var Evropa størsti marknaðurin fyri frystar kinverskar fiskaúrdráttir.

– Sambært serfrøðingum, eru fiskavørurnar úr Kina nú líka góðar, sum føroyskar, íslendskar og norskar fiskavørur.

Ì Kina, verður allur fiskurin skorin við hond, men fiskurin í Europa verður maskinskorin. Ùrtøkan við hondskering, er eini 12% størri enn við maskinskering. Hinvegin forvinnur er ein miðal arbeiðaraløn í Kina einar 650 krónur um mánaðin.

Alt hetta ger, at sostatt kunnu Kinverjar selja somu vøruúrdrattir, á somu marknaðir, sum føroyingar, íslendingar og norðmenn gera, fyri ein sølupris sum er 12 krónur lægri fyri kilo.

### Tríggir vegir fram

Egil Olsen sigur, at hetta er høvuðsorsøkin, til at at kappingin er munandi harðnað og at tað gerst truplari og truplari at virka fisk í Føroyum lønandi.

Hann sær tríggjar møguleikar fyri at vit kunnu fóta okkum í kappingini.

1. Feskar vørur og saltaðar vørur.

2. Fiskaframleiðslan má automatiserast og vit mugu leita eftir nýggjum framleiðslumøguleikum og marknaðum.

3. Hjáframleiðslur og biotøkni.

**1. Feskar vørur og saltaðar vørur**

Egil Olsen sigur, at størsti fyrimunurin, vit hava framum t.d. kinverjar, er, at vit kunnu bjóða feska-, og saltaða dygdarvøru, til kravmiklar keyparar í Europa og USA.

Men hvat feskari vøru viðvíkur, er neyðugt at leggja doyðin á, at betra um flutningsmøguleikarnar.

– Politiskt er tað týdningarmiklari at umrøða spurningin um betri flogferðslumøguleikar fyri feskar fiskaúrdráttir, enn alt tosið um undirsjóvartunlar. Skulu vit verða ein álítandi útvegari av feskum úrdráttum og røkka best møguligum prísi, er neyðugt at útvegað kundunum feskar dygdarvørur hvønn dag, alt árið.

Føroyskur saltfiskur hevur sera gott orð á sær, tí at vit hava megnað at framleitt eina javna og dygdargóða vøru, sum keyparnar hava vilja goldið ein meirprís fyri og tað mugu vit halda fast um.

**2. Fiskaframleiðslan má automatiserast og vit mugu leita eftir nýggjum framleiðslumøguleikum og marknaðum**

Hvat upsa viðvíkur, er tað neyðugt at effektiviserað framleiðsluna, soleiðis at framleiðslukostnaðurin fer niður. Tí er tað neyðugt við nýggjum framleiðsluútbúnaði, sum er arbeiðssparandi. Fyri at forrentað hesar nýíløgur, er neyðugt at virka upsan á virkjum, sum arbeiða stórar nøgdir árliga. Egil Olsen leggur afturat, at eftir eina ferð í Japan á heysti í 2002, hevur tað undrað hann ikki sørt, at møguleikarnir ikki verða kannaðir fyri at fyri selja frystar upsaúrdráttir í Japan. Liturin á føroyska upsaflakinum, er ógvuliga meinlíkur litinum á tunfiski, sum er eitt fiskaslag, sum verður mest etið í Japan.

**3.Hjáframleiðslur og biotøkni**

Fiskivinnufrøðingurin heldur, at gagnnýtsla av øllum, er ein upplagdur møguleiki, at bøta um tað samlaða kappingarførið hjá tí føroysku fiskivinnuni. Um virði fæst burturúr øllum fiskinum, stendur ein seg munandi betri í kappingini um ráfiskin.

Hjáframleiðslur, umfatar tað, sum er eftir av rávøruni, táið høvuðsvøran er viðgjørd (høvd, ryggir, skræða og fráskurður) og innvølir, sum ikki koma á land við fiskinum, men verður tveitt fyri borð - uttan rognini.

– Tað leggja enn, nógvir møguleikar fyri at gagnnýta tað hjáframleiðslu sum stavar frá fiskaframleiðsluni á landi.

Sjálvur metir hann, at virðið av tí føroysku hjáframleiðsluni var í mesta lagi 60 milliónir í 2002.

Hinvegin vísir hann á, at í 2002 fluttu íslendingar hjáframleiðslur út fyri slakar 600 millónir krónur í okkara peningi og teir vænta ógvuliga stóran vøkstur tey næstu árini.

– Sostatt er onki at ivast í, at tað liggja stórir, ótroyttir møguleikar í at gagnnýta hjáframleiðslur í Føroyum, sigur Egil Olsen.

Les annars greinina í síni heild aðrastaðni í blaðnum.

# Bílig grundstykki til sølu á Tvøroyri

**Tvøroyrar Býráð hevur eini 8-10 grundstykki, sum ætlanin er at selja so bíliga sum yvirhøvur gjørligt**

BÍLIG GRUNDSTYKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á Tvøroyri er fólkatalið fallið eitt lítið sindur og í eini roynd at fáa fólk at seta búgv á Tvøroyri, hevur býráðið nú samtykt at selja nøkur grundstykki fyri sera lagaligan prís*

**Tvøroyri:** Tvøroyrar Býráð roynir tað, hon kann, fyri at fáa fólk at búsetast á Tvøroyri.

Sum eitt lið í hesum, hevur býráðið nú samtykt at lýsa nøkur grundstykki til sølu.

Kommunan eigur eini 8-10 grundstykki inni við Ítróttarhøllina og tey hevur býráðið nú samtykt at lýsa til sølu.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at fólkatalið á Tvøroyri er aftur fallið eitt lítið sindur og at býráðið fegið vil hava fólk at seta búgv á Tvøroyri.

Hann sigur, at tískil hevur býráðið samtykt at selja hesi 8 - 10 grundstykkini fyri sera, sera lagaligar prísir, sum hann tekur til.

Nakað tal vil hann kortini ikki nevna.

Hann heldur ikki, at kommunan missur nakað við at selja grundstykkini bíliga, tí fæst fólk at seta búgv, økir tað um skattainntøkurnar hjá kommununi.

Men hann leggur afturat, at grundstykkini verða bara seld fólki, sum veruliga ætla at seta búgv í kommununi.

– Tey verða sostatt ikki seld fólki, sum eiga hús frammanundan og sum ætla at keypa grundstykki afturat við handilsligum endamáli fyri eyga, sigur hann.

Samstundis fáa tey, sum keypa grundstykkini, eitt rímiligt skotbrá at byggja sær hús, annars fella stykkini aftur til kommuna.

Borgarstjórin sigur til summi av grundstykkjunum er bæði vegur og kloakk og til onnur stykki skal bara ein vegastubbi gerast, so er klárt at byggja.

Borgarstjórin sigur, at ein ávísur áhugi er fyri stykkjunum, nú tey eru lýst til sølu.